Viðmerkingar

Oljuhavn og floghavn

Nakrar rættleiðingar til Heðin Mortensen løgtingsmann



Tá ið ein sum politikari ætlar sær at viðgera eitt mál, sum hevur áhuga fyri tað føroyska samfelagið, so er tað ikki minst átrokandi, at tað, ein skrivar, er álitandi og eftirfarandi.

Í tínari grein í Dimmu viðger tú floghavnina í Vágum. Tú upplýsir, at ein umboðsmaður frá einum oljufelag hevur sagt, at floghavnin í Vágum er ikki nóg góð. Hvat siga aðrir umboðsmenn, Heðin?

Nú er tað so, at vit hava eina floghavn í Føroyum, og er tað so útgangsstøðið innan flogferðslu í Føroyum, um ein so vil tað ella ikki.

Nú kann eg ímynda mær, hvør ið hesin umboðsmaður er, men ætlar hann at gjalda fyri eina floghavn, ella hvussu?

Tað skulu meiri pengar til at gera eina floghavn, enn tað ið ein árabátur og nakrar violinir kosta, og tað er tað ítøkiliga, sum oljuvinnan higartil hevur lagt eftir seg. Vónandi verður hetta til meira við einari komandi oljuvinnu um átta til tíggju ár.

Nú til spurningin, viðvíkjandi at tað ikki verður góðkent, at ein og tann sami flogvøllur verður nýttur til bæði oljuvinnu og ferðafólkaflutning. Til hetta kann eg upplýsa, at tað er ikki rætt.

Um vit nú hyggja at grannum okkara, sum hava verið í oljuvinnuni í mong Harrans ár, og hyggja at, hvussu teir røkja tann loftvegis flutningin, so síggja vit, at hetta er frá flogvhavnum, sum bæði hava ferðafólkaflutning og tyrluflutning. Vit kunnu nevna Sumburgh, Aberdeen, Esbjerg, Stavanger, Florø og aðrar við. So at hetta skal vera ein forðan fyri at røkja tyrluflutningin millum Vágarnar og oljuøkið er ikki satt, og má onkur hava villleitt teg í hesum málinum.

Viðvíkjandi flutningi við tyrlu til eitt oljuøki, so er tað stórt sæð bara fólkaflutningur og smærri eykalutir, sum verða fluttir loftvegis. So henda rundflugvingin til Havnar og Suðuroy kemur neyvan upp á tal. Annar flutningur sum tænastuveitingar v.m. verður fluttur sjóvegis.

Eg kann annars upplýsa, at vit her á Vága Floghavn so smátt eru byrjaðir at fyrireika okkum til eina komandi oljuvinnu, og verður tað fyrsta stigið tikið nú komandi ár, tá ein radiosendari skal setast upp í Akrabergi, soleiðis at vit fáa nøktandi radioviðurskifti suðureftir til tað komandi oljuøkið.

Annars er tú vónandi so mikið at tær komin sum landspolitikari at skipa so fyri, at ikki alt samfelagið fer av knóranum, nú ið vit skulu til at leita eftir olju, men heldur síggja til, at tær íløgur, sum longu eru gjørdar, verða nýttar á rættan hátt, tað veri seg havnir ella floghavn.

Til at enda við vil eg loyva mær at sitera allar teir, sum vit hava tosað við innan oljuvinnuna bæði í Danmark, Norra og Onglandi, og siga teir allir sum ein: »Latið vera við at byggja út, fyrr enn tit við vissu vita, hvat oljuvinnan fer at geva.«

Við tøkk fyri upptøkuna

Finnbogi Niclasen
Sørvági

Brøv til Dimmalætting

Maður og kona, kvenna og kvendi

Hetta eru nøkur grundleggjandi orð í okkara máli, sum føroyingar høvdu við sær, tá ið teir fóru heiman úr Noregi og settu bugv her á landi. Og hvørt av hesum orðum var so væl lýst, at orð og týdningur svaraðu saman. Og soleiðis hevur verið til okkara dagar. Men nú tykjast fjølmiðlar at finna fragd í at petta sundur tey orð, sum vit áður hava verið felags um, til frama fyri smáar, albogaspískar áhugabólkar. Og vørpini, sum skuldu varðveita og verja móðurmálið, sýnast mangan at vera málgøgn fyri hesar bólkar og koma tí at gera meira skaða enn gagn.

Einaferð í oktober mánað komu stórtíðindi úr Keypmannahavn, av sjálvari Kristjansborg, at tá ið fólkatingið skuldi setast, fór fólkatingsmaður fyri Føroyar, sjálvur fólkafloksmaðurin, so andbráður niðan trappurnar á Kristjansborg klæddur í føroyskum tjóðbúnað. Undir lið hevði hann tá grønlendsku landsstýriskonuna, skrýdd í grønlendskum tjóðbúnað. Hetta skuldi vera matur fyri myndatakarar.

Tíðindamenninir vóru tveir ungir føroyingar, búgvandi í Keypmannahavn. Hesir hava neyvan lagt til merkis, at á føroyskum er ein bóndakona kona ein bónda, ein fiskimanskona kona ein fiskimann, ein huldukona kona ein huldumann, og tí er ein landsstýriskona kona ein landsstýrismann. Tað má tí vera ein løgin landsstýrismaður, sum fer krúpandi inn undir skjúrtið hjá konuni fyri at kunna tekkjast føroyska fólkafloksmanninum og øllum myndatakarum. Og so fólkatingsmaður aftrat.

Nakrar dagar seinni komu aftur stórtíðindi úr útlondum, og tíðindini skuldu koma frá eini tíðindakvinnu. Tað er einki at taka seg aftur í, at hesin varparin visti navnið á kvinnuni, men at henda kvinna var konufólk, hevði hann ikki dulan dreym um, heldur ikki, um hon altíð gekk undir sama navni. Vit vita, hvussu vandamikið tað arbeiðið er at vera tíðindamaður. Og tí mugu tey, sum hava hetta til livibreyð, royna at fjala seg og sitt kyn við øllum møguligum og ómøguligum kynstrum, tá ið tey skulu bera óynskt tíðindi fyri ikki at verða kend og dripin.

Aftur her sæst, hvussu neyvt okkara mál er, um tað verður nýtt við skili, tí á føroyskum merkir ein tíðindamaður bæði mannfólk og konufólk ella bæði sløgini, so har er á føroyskum eingin mannamunur.

Tá ið føroyingar av álvara fóru undir Grønland at fiska, gjørdu danir eina lóg, sum segði, at eingin maður skuldi fáa loyvi at mynstra við Grønlandsskipi, um hann ikki frá lækna hevði fingið fullgott prógv um, at hann var eitt rættskapað mannfólk.

Ein dagin stóð ein skipsmanning uttanfyri hjá læknanum og skuldi inn. Tann fyrsti, sum slapp, var ein gamal drongur. Læknin var kvinnuligur og æt fru Mejer, tí maður hennara æt Herr Mejer. Tá hesin gamli drongur kom út aftur, vildu hinir vita, hvussu gekst. »Å, du har gode grejer, sagde fru Mejer!« svaraði hann hjartans vegin aftur.

Tað verður ein óbótalig skomm fyri okkum, um vit fara at nevna okkara starvsheiti og stjórnarsessir, eftirsum kynslimirnir eru á teimum, sum skulu átaka sær hesi størv; tí tað verður neyvan við teimum, tey fara at gera sitt dygdargóða arbeiði. Og hvør veit, um rætt skal verða rætt, at vit tá ikki noyðast at føra prógv fyri, eins og grønlandsmenn í forðum, um tey eru fullkomin menn, konur ella bæði sløgini, tí uttan á klæðunum sæst einki. Latið okkum av øllum alvi stríðast fyri javnrættindi til alt okkara fólk, men latið tað verða við ein munn og á sama máli.

Einaferð í summar var aðalfundur í Føroya Lærarafelag. Har skuldi millum annað veljast nevnd og formanskapur. Luturin fall á eitt konufólk til formann. Men hon var ikki meir enn komin í formanssessin, fyrr enn bæði hon sum formaður og formanssessurin vórðu eyknevnd forkvinna, og tað av sínum egnu. Harmiligt er, at konufólk ikki kunnu átaka sær nakað álitisstarv uttan at verða grytt undir í eyknevnum. Tað verður neyvan við kynslimunum, hesin formaður kemur at útinna tað dygdararbeiðið fyri sítt felag – teir kunnu vera góðir til sitt brúk – men heldur við tí persónsmensku, sum hesin formaður hevur fingið í vøggugávu. Tað er eisini harmiligt, at okkara ungu lærarar ikki skulu vanda sær meira um tað mál, sum skal vera undirvísingarmál teirra, enn hetta vísir.

Fyri einum góðum ári síðan var rumbul í Danmørkini, tí ein kvinnuligur fólkatingsmaður úr Javnaðarflokkinum var sligin á stert við einari atkvøðu ov lítið fyri at gerast formaður í fólkatinginum. Tá varð tann kvinnuligi formaður í C. D. spurd, hví hon ikki við síni atkvøðu hjálpti sínum kynsliga starvsbróðuri til formanssessin. Tá svaraði hon aftur, at her var ikki talan um kyn, men um arbeiði fyri land og fólk. Soleiðis tala øll rætthugsandi og vaksin menniskju, meðan tey, sum stríðast um kyn, liggja enn og gráta fyri tonnum.

Fyri nøkrum árum síðan fingu vit ein kvinnuligan landsstýrismann. Tá ið hon hevði sett seg í henda tignarstól, var eitt tað fyrsta, hon segði, at nú skuldi hon eita landsstýriskona, tí tað vóru konurnar, sum gjørdu alt arbeiði. Og arbeiða, tað skuldi hon. Eg havi ongantíð ivast í, at hon sum landsstýrismaður gjørdi eitt dygdargott arbeiði. Men, sum áður sagt, so er á føroyskum ein landsstýriskona kona ein landsstýrismann. Har vóru, umframt hana, fimm aðrir landsstýrismenn, og harumframt hevði hon ein mann heima. Hvussu dygdargott tað arbeiðið var, havi eg onga hóming av. Hon slepti sær skjótt úr hesum sessi og endaði sum løgmaður. Og tað var longst sum best fyri hana.

Seinni varð hon vald til formann í løgtinginum. Aftur lupu fjølmiðlar á hana og kallaðu hana fru formaður, og fleiri tingmenn tóku undir, tó ikki allir. Teir hava helst sæð spottið í hesum tiltaluformi.

Nú vita vit, at á føroyskum eitur frú Petersen kona harra Petersen, frú Joensen kona harra Joensen, og frú formaður kona formannin. So aftur har mátti formaðurin stinga høvdið undir skjúrtið hjá konuni og goyma tað væl.

Løgið er, og harmiligt tykist at vera, at nógv av tí unga fólkinum gleivbeint tekur við øllum tí málsliga ruski, sum rekur inn á okkum, meðan tey samstundis blaka fyri bakka okkara dygdargóða mál, sum hevur fylgt okkum øld eftir øld sum ein góður fylgisveinur. Vit skuldu ongar áneyðir havt at herma eftir donskum fólkatingsmonnum, tá ið teir tiltaka formann sín herr formand, tá ið vit hava eitt nógv betri og tignarligari tiltaluorð í okkara máli, sum hevur verið nýtt at tiltala tann við, sum tú hevur virðing fyri. Hetta orðið eitur tygum. Børnini vórðu lærd at siga tygum abbi, tygum omma, tygum lærari, tygum prestur. Og øllum teimum, sum tú møtti á leiðini og vildi tala virðiliga til, vóru tey lærd at siga tygum við. Tygum er okkara tiltaluorð, og tí eigur formaðurin at verða tiltalaður: »Tygum formaður!« um vit skulu nýta okkara egna mál. Og so er tygum eisini kynleyst og skuldi sostatt ikki stoytt nakran.

Um hetta mundið fór ein tingmaður spakuliga gangandi niðan á røðarapallin. Tá sást ein lítil foyra ganga frá munnvikanum upp undir eygað á vinstra kjálka, og eitt lítið smíl gjørdi seg til á kjálkanum. Meðan hann gekk, breiðkaðist foyran á kjálkanum. Komin niðan á røðarapallin undir líðina á formanninum stóð hann eina løtu og ivaðist, og foyran breiðkaðist meira og meir. Til endans vendi hann sær ímóti formanninum og hugdi, ikki upp í eygunum á honum, sum vanligt er, tá ið tú skalt tala til onkum, men frá bringuni og niðureftir, og segði heldur ullint: »Fru formaður!« Tá hevði hann ilt við at bara sær. Tá sást, at hann var ikki sørur í føroyskum. Gamalt er sagt, at eingin er fullspottaður, fyrr enn hann spottar seg sjálvan.

Fyri nøkrum árum síðan hoyrdist ein harri standa og bregga sær av øllum teimum próvbrøvum, sum hann hevði ognað sær. Við teimum ivaðist hann ikki í, at hann hevði sjálvsagdan rætt til okkurt av teimum fremstu tignarstørvum í okkara fjølmiðlaheimi. Tá hann so varð spurdur, um hann hevði nakað prógv í føroyskum, svaraði hann: »Á nei, á nei, tað nýtist ikki, tí føroyskt dugdi hann, tá ið hann var fimm ár«. Tó skuldi tað verið tað fyrsta, sum varð kravt av einum, sum skuldi stila fyri okkara fjølmiðlastovni, serliga á tíðindadeildini, at hann hevði prógv fyri, at hann dugdi føroyskt mál væl og virðiliga. Tað hevði ikki bara verið honum sjálvum og okkum øðrum at gagni, men eisini teimum ungu og óroyndu til vegleiðingar.

Men er hetta hugburðurin hjá teimum flestu, at føroyskt skulu vit ikki læra okkum, tað kunnu vit gita okkum til, so er ikki so løgið, at ein ropar í horni, og annar í sorni, og hvør hevur sína meining um, hvussu okkara móðurmál skal handfarast, tí teirra meining er einasta meining, sum nøkur meining er í.

Hví munnu so mong fjølmiðlafólk og onnur, ung sum eldri, vera so gramm eftir at spjaða heldur enn at savna í málinum? Tað kann ikki koma av øðrum, enn at tey ongantíð hava viljað lært seg føroyskt mál og tí heldur ikki hava kent tá frøi, sum eitt so ljóðfagurt mál sum føroyskt kann veita teimum.

Tað var einaferð eitt gløgt høvd, sum segði, at konum hava vit almikið av. Og tað er so satt, sum tað er sagt. Konunavnið er knýtt at nógvum nøvnum. Vit kunnu nevna nøkur fá, sum til dømis arbeiðskona, neytakona, krambakona, sópingarkona, og til sjeynd og síðst bara kona. Nú leggja vit til merkis, at allar hesar konur hava onkran yvir sær, eru í arbeiði hjá onkrum, sum sigur teimum, hvat tær skulu gera, hvørja frítíð tær skulu hava, hvørja løn tær skulu fáa, og hvat navn tær skuldu ganga undir, inntil vit koma til orðið kona. Tá eru vit komin á ovastu hill við orðinum, tí á føroyskum merkir kona ein, sum hevur givið seg í samljóð við ein mann at stovna eitt heim saman, at liva saman í hjúnalag, at halda hús saman, eiga børn saman, at ala ein barnaflokk saman. Tá hevur hon sama rætt, somu skyldur og felags løn. Tá er hon runnin saman við mannin til eitt hold. Tá er javnstøðan fullkomin teirra millum.

Soleiðis er eisini við teimum størvum og tignarsessum, sum bæði kynini eru búgvin til og kunnu kappast um. Har eru bæði kynini runnin saman í ein hóp við sama rætti, somu skyldum, somu løn og sama navni. Her hevur felagsnavnið frá araldstíðum verið maður. Nú eru vit komin upp um tað markið at vera arbeiðsfólk undir øðrum til sjálvi at stila fyri tí arbeiði, sum tey hava fingið lítið upp í hendur. Tað er tí ein vanvirðing av teimum, sum hesi størv hava tikið upp á seg, og ein vanskepling av tí máli, sum er okkara móðurmál, tá ið hesi verða eyknevnd konur, kvinnur ella kvendi. Tann, sum situr í landsstýrisstólinum eitur landsstýrismaður, kvinnuligur ella mannligur. Ein landsstýriskona er annaðhvørt kona ein landsstýrismann ella ein, sum hevur okkurt arbeiði í landsstýrinum, vaskar gólv, pussar rútar, ella gongur landsstýrismonnunum til handa. Sama er við einum landsstýriskvendi.

Somuleiðis er ein formaður, ein semingsmaður, starvsmaður, ein lækni, ein sakførari ella juristur, ein prestur, ein lærari, sum øll eru í kallkyn, bæði kvinnulig og mannlig. Og tí er einki løgið í, tí tann einasti sjónligi munur á manni og kvinnu eru kynslimirnir, og teimum er mestsum einki brúk fyri í starvs- og stjórnararbeiði.

So koma vit til orðið kvinna, sum summi eru so gapað í. Vit hava frá okkara forfedrum fingið ein hóp av orðum, sum merkja konufólk. Tvey av teimum eru kvenna og kvendi. Tað finnast nógv orð, sum hava til fremra lið kvenna, sum t.d. kvennkyn, kvennbarn, kvennleggur, kvennmaður, kvennkallur, kvennhetja o.s.fr., sum øll merkja konufólk. Men í gomlum døgum var tað mest brúkta orðið í dagligari talu kvendi fyri konufólk. Men sum tíðin leið, var tað so nógv slitið av nógvum briksli, at tað valla var hóskandi til samiligt brúk, og endaði sum okvæmisorð. Tað kom tí sum av sær sjálvum, at hetta orðið kvendi, sum á donskum eitur kvinde, í dagligari talu kvinne, varð skákað inn í føroyskt mál sum kvinna. Hetta er eitt snøgt, vælhóskandi orð í okkara máli, men at láta tað verða halastýrara í øðrumhvørjum álitis-, starvs- og stjórnarsessi, fer helst at verða ovboðið. Tá kann kvendi lættliga koma at verða tað meira hóskandi orðið aftur.

Nú er tað at siga, at orðini kona og kvinna eru tvey javnsett orð í føroyskum fyri ogift konufólk, sum eru í arbeiði hjá øðrum. Men koma tær í ein álitissess, har kynini hava sama rætt, ganga tær undir felagsnavninum maður. At seta ein kíla inn í henda sannleika er tað sama sum at gera vold á málið, spjaða og sora tað sundur, til vit til síðst standa eftir á berum og glana.

Nú hoyri eg, at fjølmiðlar eru farnir at tala um tingfólk, tinglimir og annað. Góð orð, men tey hava síni egnu serskildu brigdir í málinum, tí eiga tey ikki at verða trokað inn á onnur orð og taka luvin av teimum. So verður málið tað fátækari.

Fyri nøkrum árum síðan fingu vit tvey vørp, sum fyrst og fremst vóru ætlað at varðveita okkara móðurmál, styrkja og stimbra tað, so at tað kundi verða javnbjóðis við øll onnur mentað mál í heiminum. Tó, tað fer ikki at bera til, uttan at tey fólk, sum har ráða fyri borgum, hava fingið hollan lærdóm í føroyskum.

Fyri gott og væl hundrað árum síðan royndu Jóannes bóndi, Rasmus Effersøe og onnur at byrgja upp fyri tí málspillu, sum tann danski barnaskúlin í Føroyum fløddi inn á okkum. Tað skuldu tó ganga fýrsinstjúgu ár, fyrr enn føroyskt stóð á tímatalvuni í øllum skúlum í Føroyum, og tað vóru nakrir av teimum størstu, sum vóru teir seinastu. Tey børn, sum har hava gingið, liggja nú um triss ár. Tey hava ongantíð havt føroyskt á tímatalvuni. Fyri teimum kennist danskt sum móðurmálið, og føroyskt sum fremmandamál. Tað er tí so vorðið, sum er.

Rasmus Effersøe hevur givið okkum hetta ørindi:

Fátæka fólk:
Lítið tú virðist av monnum,
hevur enn ilt fyri tonnum;
nýfødda fólk!

Nú eru liðin hundrað ár, síðan hesin sangur varð yrktur, og enn stríðast vit at fáa barnatenninar undan.

I.

Minningarorð

Minningarorð um
Pól Eyðfinn Ólason Poulsen

Tað vóru tung boð at frætta henda sunnumorgun tann 31. oktober. Beiggi tín Ólavur ringdi til mín. Eg hoyrdi á málinum, at okkurt var hent. Hann segði, at »Ágot« hevði fingið ein sjógv, og tú, góði Pól Eyðfinn, var so meint raktur, at tú doyði av hesum løsti.

Tað er so óskiljandi at missa ein so góðan mann og pápa á so ungum aldri, bert 35 ára gamal, frá fýra børnum.

Tú hevði nógvar planir fyri framman, tú hevði bygt tær nýggj hús, og tær untist bert at búgva í teimum í hálvtannað ár.

Eg minnist, hvussu glað tú og Simona vóru, tá ið tit vístu okkum runt í húsinum. Tú vart altíð so lættur í sinni og í góðum lag. Við tínum vakra smíli.

Tú vildi Simonu og børnunum alt tað besta. Eg minnist teg sum lítlan smádrong, vit vóru sera góð við teg, tú vart tann fyrsti av øllum børnunum. Tú búði hjá ommu og abba úti í Víkunum eina tíð, tey elskaðu teg fram um alt, tað var nakað serligt, tey høvdu yvir fyri tær, góði Pól Eyðfinn.

Tað er so tungt at festa niður á blað, men vit hava nógv góð minnir um teg.

Tað verður sera tungt at samlast hjá ommu og Palla á jólum, og tú ikki ert ímillum okkum longur.

Tú vart ungur drongur, bert 16 ára gamal, tú kundi leggja tín persónliga vitnisburð av við trúgv á Harran Jesus.

Góði Hjaltur, Eyðstein og manningin. Tað hevur verið ein ógvuliga tung løta at síggja beiggja tykkara fara inn í deyðan, men tit gjørdu, hvat tit kundu, at bjarga honum. Tit róptu til Gud í neyðini.

Tað er ein stórur saknur hjá tykkum Simona og børnini, Óla, Ágot, systkinum, ommu, Palla, Kós ommu og Ísak við familju, at hava mist Pól Eyðfinn, sum vit øll vóru so góð við.

Góði lítli Ísak, tað besta av øllum var, at tú kláraði at fara við »Ágot« eftir tann lagnutúrin, teir høvdu verið út fyri.

Eg vil enda við hesum sangi, sum tú, góða Simona, vildi hava sungnan umborð á »Ágot«, tað kvøldið teir loystu frá kei aftur.

Hjá Jesusi fann eg tann friðin,
eg leitaði eftir mong ár.
Mær longdist, eg bað, og eg
spurdi
um vegin, – og feldi mangt tár;
eg las, og eg las í Guds orði,
eg las um tað lívsins breyð,
og ongan tú stoytir burt frá tær,
ið kemur til tín í neyð.

Eg var vónbrotin, troytt og
mær longdist
at finna frið við tín kross
og tú vístu mær vegin –
eg trúgvi,
hjá tær eg nú eigi eitt pláss.

Tá sá eg tann krossfesta Jesus,
hann hekk har og bløddi for meg,
og tað var, sum ein rødd við
meg segði:

»Alt hetta eg gjørdi for teg«.
Mítt hjarta tá fyltist við gleði,
tú syndir mínar burt tók.
Mítt navn, ja, mítt navn tað er
skrivað,
ja, skrivað í lívsins bók.

Hjá Jesusi fann eg tann friðin,
sum halda kann í lívsins stríð.
Hjá Jesusi, eina hjá honum
ein mannasál verða kann frí.
Hjá Jesusi fann eg tá gleði,
ið heldur á lívsins leið,
um sorgir og trongdir meg níva,
í Hansara fótspor eg steig.

Ærað veri minnið um mín elskaða Pól Eyðfinn.

Fastir

Samfelagsórættvísi

Alt samfelagsvirksemi er órættvíst skipað kring landið, tá ið so nógv fyribrigdir í dagliga lívinum gera mun á øllum ættarbólkum.

Tað er eingin, ið hevur loyvi til at fremja diskrimination, forfylging, forfjónan, hóttan, kúgan, mannajagstran og finna sær almennar syndabukkar.

Tað er órættvíst, at ikki allir føroyingar fáa somu lívs- og arbeiðstreytir og virkismøguleikar til lesnað og lærupláss og frítíðarítriv allastaðni.

Tað er alt órættvíst, tá tað verður ríkin familju-, vina- og kenningarpolitikkur úti á øllum arbeiðsplássum kring alt landið, ið ein finst harðliga at.

Tað er órættvíst, tá ikki allir føroyingar eru líka fyri lóg og rætti, ið nógv dagliga traðka undir fót, og sum vit hava nógv dømir um.

Tað er órættvíst at hava bíliga arbeiðsmegi og svarta arbeiðsmegi, ið tekur øll arbeiðir/størv frá limum í øllum arbeiðara- og fakfeløgum, ein finst harðliga at.

Tað er órættvíst, at lesandi føroyingar eldri enn 18 ár fáa lestrarstuðul, 3.000 kr. um mánaðin og fríkort at forvinna 15-17.000 kr. skattafrítt um árið, ein finst harðliga at.

Tað er órættvíst, at lesandi føroyingar í dag skulu fáa betri fortreytir og grundarlag at liva og virka kring alt landið í mun til øll undir ALS og Almannastovuni.

Tað er órættvíst, at lesandi føroyingar skulu sleppa undan at røkja nakrar ábyrgdir og skyldur eins og aðrir borgarar gera.

Tað er órættvíst, at so nógv almenn tiltøk verða skipað til frama fyri børn og ungdóm, í mun til tilkomin fólk, ein vil finnast at.

Tað er órættvíst, at okkara eldru fólkapensionistar skulu fáa so ringar sømdir í mun til øll tey, ið koma til bugvið borð og skorin klæðir uttan at rætta hond frá síðu. Tað verða ikki børn og ungfólk, ið koma at føra nakað samgfelag úti í húsarhaldinum víðari, tá alt fer at steðga upp av sær sjálvum. Tá verður lætt at vera klókur aftaná, tá man ikki vildi lurta eftir góðum ráðum at tryggja seg og síni at hava nakað at standa ímóti við í ringum tíðum.

Tað eru praktisku lívsroyndirnar, ið fara at spæla ein avgerandi leiklut, fáa vit arbeiðsloysi, kreppur, trupulleikar eftir ártusundskiftið.

Tað er víst, mín partur skal ikki liggja eftir at veita hjálp og ráð og moralskan stuðul, hvat ið ein dagliga ger.

Tað hevur gingið fram á at gera vart við samfelagsórættvísi, ið gevur øllum innlit og forstáilsi og økta tilvitan, hvussu alt er skipað.

Hans Birgir Hansen